Jørn Astrup um bruttoskattalógina:

# Bankarnir hava víst á vandan

**Jørn Astrup Hansen heldur tað vera nógv fyri, at peningastovnarnir nú fáa skyldina fyri, at skipanin við rentustuðli er vorðin torfør at umsita og ábendingar eru um misnýtslu**

BÚSKAPUR
*Heri á Rógvi*



*Jørn Astrup Hansen heldur, at politikararnir eiga sjálvir skuldina fyri, at skipanin við rentustuðli verður misnýtt*

Í seinastu hevur tað í fjølmiðlunum verið varpað ljós á spurningin um skipanina við bruttoskattalógini. Peningastovnarnir eru vorðnir kritiseraðir fyri teirra leiklut, har funnist serliga verður at tí, at bankarnir ikki vilja samstarva við myndugleikararnar um eftirlit við lánum og viðurskifti í tí sambandi. Ikki minst í oddagreinini í Sosialinum fríggjadagin, og hetta hevur fingið Jørn Astrup Hansen, forstjóra í Føroya Banka, at svara aftur.

– Tað er ikki rímiligt, at politikarar og fjølmiðlarnir geva peningastovnunum skyldina, nú tað vísir seg, at rentustuðulsskipanin er torfør at umsita og eftir øllum at døma hevur givið høvi til misnýtslu.

Peningastovnarnir hava fleiri ferðir ávarað ímóti skipanini, sum umsiting-arliga er eitt monstur og sum bjóðar til misnýtslu. Um tað eru nøkur skyldug í hesum málinum, eru tað politikararnir, sum skundaði eina vánaliga lóg ígjøgnum, og sum valdu at yvirhoyra allar ávaringar, tá tíð var til tað. Og so skulu tað nokk vera nakrir uppfinningarsamir húsaeigarar, sum hava verið minni umhugsnir og hava havt møguleikan til at fíggja eitt bilkeyp við pant í húsinum. Men eg kann ikki trúgva, at peningastovnarnir vitandi hava viðvirkað til at snýta skattamyndugleikan, sigur Jørn Astrup Hansen í sínum lesarabrævi, ið stendur prentað í fullum líki aðrastaðni í blaðnum.

Jørn Astrup Hansen setir eisini spurnartekin við, hví hetta verður tikið fram í ljósmálan nú, tí peningastovnarnir hava ferð eftir ferð gjørt vart við hetta.

Hann heldur, at í framtíðini kundu landsins myndugleikar lagt seg meira eftir at lurta eftir fólki við fakligari vitan, tá sovorðanar lógir skulu gerast.

# Ríkisfundur í Vágum



*Tað verður Skipaeftirlitið í Miðvági, sum verður karmur um ríkisfundin á hesum sinni. Eisini verður fundast í skúlanum í Bø mikumorgunin*
*Mynd: Edvard Joensen.*

**Í dag – týsdagin – verður ríkisfundur hildin í Vágunum**

RÍKISFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Tað er ikki á hvørjum degi, at vágafólk hava ríkisfund í oynni. Ì dag – týsdagin – hittast teir tríggir, Anfinn Kallsberg, Jonathan Motzfeldt og Anders Fogh Rasmussen, á ríkisfundi í Miðvági. Ríkisfundurin verður á Skipaeftirlitinum í Miðvági, og hann byrjar kl.17.30. Anders Fogh Rasmussen, danski forsætisráðharrin, og Jonathan Motzfeldt, grønlendski landsstýrisformaðurin, koma til Føroya við flogfarið seinnapartin týsdagin.

Fylgið hjá Anders Fogh Rasmussen er rímiliga stórt. Hann hevur hevur átta fólk afturat sær í sínum fylgi í flogfarinum úr Keypmannahavn. Talan er um embætisfólk, ið starvast hjá Statsministeriet. Harumframt verður eisini ríkisumboðið í Grønlandi roknað uppí fylgið hjá forsætisráðharranum.

Grønlendski landsstýrisformaðurin hevur, umframt frú, eisini trý embætisfólk við sær.

– Stjórnin leggur stóran dent á, at vit hava eitt gott og konstruktivt samstarv í ríkisfelagsskapinum.

Eg gleði meg tí til at skifta orð við løgmann og landsstýrisformannin, sigur Anders Fogh Rasmussen í tíðindaskrivi.

Anfinn Kallsberg ger viðmerkingar til ríkisfundin aðrastaðni í blaðnum í dag.

Annars er tað at siga um skránna, at Anders Fogh og Jonathan Motzfeldt koma til Føroya kl. 16.40, og teir fara longu í eldin kl. 17.30. Fundurin er settur til at enda kl. 20, tá tíðindafundur er á skránni í hølunum hjá Skipaeftirlitið.

Sum altíð verður eisini skipað fyri einum døgurða í glæsiligum umhvørvi. Klokkan 21 verða húsini hjá Húsmøðrafelagnum í Sørvági karmur um ein døgurða fyri teir tríggjar stjórnarleiðararnar og teirra fylgi.

Mikumorgunin verður stuttur fundur hildin í skúlanum í Bø millum Anders Fogh Rasmussen og Anfinn Kallsberg. Klokkan tíggju kemur Jonathan Motzfeldt eisini á fund til klokkan 10.30, tá reikað verður av, og klokkan 11 fer Anders Fogh Rasmussen við Atlantic Airways til Keypmannahavnar.

### Útnorðurfundur

Hóast Anders Fogh Rasmussen fer avstað, so verður Jonathan Motzfeldt kortini hangandi í okkara parti av heiminum við fylgi sínum. Mikudagin verður nevniliga útnorðurfundur, sum er tann fyrsti av sínum slag í longri tíð.

Íslendski forsætisráðharrin, Davíð Oddson, og fylgi koma til Føroya mikudagin kl. 16.40. Klokkan 19 verður útnorðurfundur, har Davíð Oddson fer at fundast við Anfinn Kallsberg og Jonathan Motzfeldt.

Eisini kemur Vígdis Finnbogadóttir, fyrrverandi forseti, til landið.

– Forsætismálaráðharri Íslands verður gestur løgmans hósdagin 22.08 og fríggjadagin 23.08, har hann fær høvi at hitta myndugleikar, vinnulív og mentanarlív okkara. Íslendski forsætismálaráðharrin fer avstað aftur við Atlantsflogi fríggjadagin seinnapartin beinleiðis til Reykjavíkar, sigur løgmansskrivstovan í tíðindaskrivi.

# Tveir nýggir bygningar



*Tað er á hesum økinum við FK í Hoyvík, at gjørt verður klárt til tveir nýggjar bygningar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Á økinum við FK í Hoyvík verður gjørt klárt til tveir nýggjar bygningar**

BYGGING
*Heri á Rógvi*

Í Brekkutúni í Hoyvík – har m.a. FK og Oljumálstýrið halda til – eru menn farnir undir at gera klárt til tveir nýggjar bygningar. Tað er lendi við síðurnar av húsunum hjá samkomuni Emmanuel, sum í hesum døgum verður gjørt klárt, planerað. Økið hevur staðið órørt síðani stykkað varð út í Hoyvík. Langt um leingi verður so gjørt klárt til tveir nýggjar bygningar. Upprunaliga var talan bert um eitt grundstykki, men økið er síðani vorðið til tvey grundstykki.

Annan av bygningunum eigur Kaj Andreasen & Co. Fyritøkan, ið fæst við sølu av ymsari útgerð mest til byggiarbeiði, hevur áður húsast á Sandvíkarhjalla, men nú verður alt virksemið flutt oman í Hoyvíkina. Kaj Andreasen sigur, at bygningurin verður einar 500-600 $m^2$ til støddar. Bygningurin skal hýsa handli, skrivstovu og goymslu hjá Kaj Andreasen & Co. Farið verður í gongd við at byggja í heyst, men tað er enn óvíst, nær byggingin verður liðug. Eftir ætlan verður eisini parkerað á økinum hjá Kaj Andreasen, soleiðis at FK-kundarnir fáa gott rúm til bilarnar.

Hitt økið eigur SP/F Trygil. Felagið eigur bátarnar M/S Brattanes og M/S Goliath. Brattanes er ein línubátur og Goliath er ein sleipibátur.



# Hevði eg kunnað so var eg rýmdur

**Sjúklingar á sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn, siga, at tað er ikki livandi á hotellinum. Hetta er størsti brølari, sum nakrantíð er gjørdur í heilsuverkinum, siga tveir av sjúklingunum**

HEILSUVIÐGERÐ UTTANLANDS
*Áki Bertholdsen*



*– Tað verður snøgt sagt púra onki gjørt fyri trivnaðin hjá fólki. Fólk, sum búgva her, eru mangan rættiliga sjúk og tí hevur trivnaðurin alstóran týdning, men trivnaður er als ongin, sigur Jákup Oluf Breiðaskarð*

– Hetta er størsti brølari, sum nakrantíð er gjørdur í føroyska heilsuverkinum.

Dómurin, sum sjúklingar fella yvir føroyska sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn, er harður. Vit hava tosað við tveir av sjúklingunum, sum búgva á hotellinum og teir siga báðir, at umtøðurnar á hotellinum eru so vánaligar, at tað er ikki livandi, sum teir taka til.

Og teir skuldu vita, hvat teir tosa um, tí teir hava verið leingi á hotellinum. Jákup Oluf Breiðaskarð úr Fuglafirði hevur skjótt búð á hotellinum í tvey ár og Bjarti Mortensen á Tvøroyri hevur verið har í átta mánaðir.

Jákup Oluf hevur fingið nýggj lungu og Bjarti bíðar eftir at fáa nýggj lungu.

– Umstøðurnar á hotellinum eru so vánaligar, at hevði eg havt umstøður til tað, var eg rýmdur onkra aðrastaðni at búð, sigur Jákup Oluf.

Bjarti Mortensen sigur somuleiðis, at tað er ótolandi at búgva á hotellinum.

### Sleppa ikki í bað

Tað, sum teir báðir serliga fýlast á, er, at húsið er í so ringum standi.

Eitt nú siga teir siga, at svampur er í nøkrum av kømurunum og tað hevur verið til stóran ampa hjá teimum sjúklingum, sum hava havt tey kømuruni.

– Somuleiðis virkar útluftingin ikki og tað er lítið tespuligt, tá ið tað eru 30 hitastig uttanfyri. Sólin stendur í vindeyguni og tað er ikki verandi inni á kømurunum um dagin og tað er ov heitt at sova.

Nýliga frættist eisini, at legionellabakteriur vóru staðfestar í vatninum í húsinum. Legionellabakterian kann elva til legionersjúku, sum er ein álvarsligur lungnabruni.

– Hetta er serliga álvarsamt hjá fólki, sum eru sjúk, tí ofta er immunverjan frammanundan veik av sjúku.

Tískil hevur embætislæknin í Keypmannahavn rátt okkum frá at fara undir brúsu til bakterian er bast. Tey, sum eru sjúk við veikari immunverju, eitt nú sjúklingum við lungnasjúkum og hjartasjúkum, sleppa tí ikki undir brúsu, hóast tað eru 30 hitastig uttanfyri.

– Bjarti Mortensen sigur, at tað eru einir 15 sjúklingar á hotellinum, sum sostatt ikki sleppa í bað, men mugu vaska sær við lappa frá hálsinum og niðureftir og andlitið og hárið mugu teir einans vaska í kókaðum vatni.

Legionella bakterian trívist best í hita ímillum 20 og 45 stig, men tað er ikki óvanlig í stórum húsum at lækka hitan á tí heita vatninum fyri at spara, sigur embætislæknin í eini frágreiðing og leiðbeining til sjúklingarnar á Hotel Tórshavn. Hann leggur tó afturat, at vandin fyri smittu er ógvuliga lítil, men kortini er neyðugt at vera fyrivarin.

Sjúkueyðkennini eru sum við influensu og fepur og turrur hosti, men bakterian kann elva til lungnabruna, sum kann gerast álvarsligur, serliga hjá fólki, sum eru veik frammanundan.

Bæði Bjarti Mortensen og Jákup Oluf Breiðaskarð siga, at tað er hent, at fólk, sum eru niðri á sjúkaørindum heldur fara onkra aðrastaðni at vera, heldur enn at verða á hotellinum, tí tey tora ikki at búgva á Tórshavn.

Tá ið málið um legionella bakteriurnar tók seg upp, vóru tað eisini nøkur, sum heldur lótu seg leggja inn á Ríkissjúkrahúsið, enn at vera á hotellinum.

Teir vísa eisini á, at í summum førum hevur Ríkissjúkrahúsið mælt sjúklingum til at finna sær onkra aðra staðni at vera, heldur enn at fara á Hotell Tórshavn.

### Vánalig kømur

Teir siga báðir tað kann ganga hjá fólki, sum eru á hotellinum nakrar fáar dagar.

– Men hjá fólki, sum skulu vera her leingi, er tað ótolandi. Tað eru ongar íbúðir til fólk, sum hava langa sjúkralegu, so líka mikið um talan er um einsamalt fólk, ella talan er um heil húski, so hava tey bara eitt lítið kamar. Tað eru fólk, sum hava búð tvey, trý og fýra inni á einum lítlum kamari í vikur, eitt nú tá ið tey eru niðri við sjúkum børnum.

– Tað er ikki lív. Tað rætta hevði verið, at fólk, sum skulu vera her leingi, høvdu eina lítla íbúð, men tað er onki, sigur Jákup Oluf breiðaskarð.

Tað kemur eisini fyri, at tað eru so fult á hotellinum, at fólk mugu verða flutt runt á hotellinum fyri at fáa kabalina við mannfólki og konufólki á kømurnunum at ganga upp.

Sostatt er tað ikki óvanligt, at fólk hava eitt kamar eina nátt, eitt annað kamar náttina eftir o.s.fr. og tað hevur enntá verið reitt upp á einum baðiverilsi fyri at fáa rúm fyri øllum.

Teir halda eisini, at hotellið liggur illa fyri, tí har er púra onki fríøki rundanum, so nógv fólk sleppa ikki út og sambandið við bussi er trupult.

– Tað verður snøgt sagt púra onki gjørt fyri trivnaðin hjá fólki. Fólk, sum búgva her, eru mangan rættiliga sjúk og tí hevur trivnaðurin alstóran týdning, men trivnaður er als ongin, sigur Jákup Oluf Breiðaskarð.

– Her sita vit so, uppi á fimtu hædd, mitt í Keypmannahavn og tað er einki stuttligt í longdini.

Jákup Oluf Breiðaskarð og Bjarti Mortensen siga, at teir hava gjørt báðar teir undanfarnu landsstýrismenninar í heilsumálum varugar við støðuna, men at teir hava ikki fingið so mikið sum eitt svar.

# Hættaði sær ikki at vera á Hotel Tórshavn

**Johan Dahl, løgtingsmaður, fer nú at reisa málið um tær vánaligu umstøðurnar á Hotel Tórshavn á Løgtingi**

HEILSUVIÐGERÐ UTTANLANDS
*Áki Bertholdsen*

Ein av teimum, sum sjálvur hevur merkt eitt sindur av, hvussu vánaligar umstøðurnar á Hotel Tórshavn eru, er Johan Dahl, nývaldur Løgtingsmaður fyri sambandsflokkin í Suðuroy.

Og hann sigur, at tá ið hann kemur heimaftur, fer hann at reisa málið í tinginum.

Hann er í løtuni niðri í sjúkraørindum við einum barni, men hann hættaði sær ikki at gista á Hotel Tórshavn og læknarnir á Ríkissjúkrahúsinum ráddu honum eisini frá, og hann fann sær tískil aðra gisting í Keypmannahavn.

– Eg hætti mær ikki at fara á hotellið við einum sjúkum barni so fyri at tryggja meg, fann eg aðra gisting, sigur hann.

Hann sigur, at nú hann kemur heimaftur, fer hann at reisa ein skrivligan fyrispurning í Løgtinginum til Bill Justinussen, landsstýrismann í heilsumálum, um viðurskiftini á Hotel Tórshavn.

Hann sigur, at hóast hann ikki sjálvur hevur gist á hotellinum, hevur hann tosað við sjúklingar, sum búgva á hotellinum og tað, sum teir siga, ljóðar ikki gott.

– Mær er sagt, at trupulleikin er ikki nýggjur og eg skilji ikki, at onki er gjørt við hann, sigur hann.

Hann sigur, at tað er ikki bara hetta, at tú kanst verða smittaður við legionella, eins og greitt er frá í greinini omanfyri.

– Men bara tað, at fólk, sum frammanundan hava sjúku at dragast við, eisini skulu hava ampa av at vera á hotellinum, átti at verið nógv mikið til málið varð tikið upp.

### Kann ikki vera rætt

Hann vísir eisini á, at tað er púra onki fríøki við hotelli og tað kann ikki vera meiningin, at sjúk fólk skulu sita í einum blokki mitt í Keypmannahavn, har summi ikki hava møguleika fyri at sleppa út.



*Tað skal veratrygt og gott at vera á Hotel Tórshavn og tí er tað neyðugt hjá okkum politikarum at taka ónøgdina hjá sjúklingum til viðgerðar, so at vit finna eina loysn, sigur Johan Dahl, sum eisini hevur merkt trupulleikarnar*

Johan Dahl sigur, at tað er neyugt at gera vart við støðuna, so at málið kann vera tikið upp politiskt og tí fer hann at reisa fyrispurningin, so at trupulleikin kann vera loystur.

– Eg ætli mær at spyrja landsstýrismannin, hvat hann ætlar at gera fyri at loysa trupulleikarnar, sum eru, so at tey, sum hava brúk fyri hotellinum, fáa betri umstøður.

– Eg haldi, at minsta kravið er, at tey, sum hava brúk fyri hotellinum, eru nøgd við umstøðurnar og føla seg trygg. Tað kann ikki vera rætt, at tey, afturat sjúku, skulu bera ótta fyri at vera á hotellinum, tí tað er leggja teimum stein oman á byrðu.

– Har skal vera trygt og gott at vera og tí mugu vit taka málið upp og finna eina virðiliga loysn.

Sjálvur heldur Johan Dahl ikki, at umstøðurnar eru nóg góðar.

– Eitt nú haldi eg, at hotellið átti at havt ein buss, sum kundu koyrt aftur og fram við sjúklingum og teirra avvarðandi, eitt nú til Ríkissjúkrahúsið og til ymisk fríøki, so at tey eisini sluppu út og tað er heldur ikki nøktandi, at skipanin, sum luftar út og heldur svalligt inni, ikki virkar.



*Tað er á fimtu hædd í hesum húsinum, at sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn heldur til. Men umstøðurnar eru út av lagi vánaligar, siga sjúklingar, sum hava verið leingi á hotellinum*